# lívdin
**- í lívd hins hægsta**

Mai 2009




## Logos Hope vitjan



*Mynd: Tórvør Vang*

Sunnudagin 19. apríl høvdu vit vitjan av fólki frá Logos Hope, sum lá við bryggju í Havn. Onkur av teimum helt talu, og samrøður vóru við tey, eins og tey høvdu okkurt til børnini.



## Trúarstig heldur enn afturstig

Ein samkoma, ið ikki vil taka trúarstig, er ein samkoma, sum hevur afturstig! Vit mugu spyrja henda spurningin: „Hava vit trúgv og álit á, at Harrin skal leiða okkum í nýggjum avgerðum?“ Spurningurin er umráðandi at seta, nú vit fara undir at byggja, tí hann hjálpir okkum at finna grundarlagið fyri nýggjum trúarstigum. Tað eru nógvar samkomur, sum vita, hvat Harrin vil, men aftra seg við at taka neyðugu stigini. Tað kann vera ivi, sum ger tað. Tað kann eisini vera ótti fyri tí óvissa, ella hvat onnur halda. Ein samkoma, sum kennir vilja Guds, kann líta á, at Harrin eisini skal útvega alt, sum krevst fyri at vera kalli Hansara lýðin. Latið okkum vera ein samkoma, sum velur trúarstig heldur enn afturstig.



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Vitjan av Jesus Revolution

Í døgunum 17. apríl til 1. mai høvdu tey ungu í Lívdini vitjan av einum liði frá Jesus Revolution. Liðið var mannað við fólki í aldrinum 18 til 37 ár úr fimm ymsum londum í Evropa.

Tær báðar vikurnar, ið liðið var her, høvdu tey m.a. workshop, undirvísing, útimøti og eitt evangeliskt tiltak fyri tey ungu. Eftir at hava verið her í tvær vikur, eru tey farin víðari til Eysturoynna, har tey fara at samarbeiða við Kelduna og Lívsins Orð.



*Myndir: Tórvør Vang*

## Tillukku við hjúnabandinum



Leygardagin 4. apríl giftust í Ebenezer Marita Jøkladal, Hoyvík, og Ásbjørn Viderø Gunnarsson, Tórshavn. Móttøka var í Ebenezer eftir vígsluna, og veitslan var fyri innbodnum í B36-húsinum.



Pálmasunnudag 5. apríl giftust í Ebenezer Elin Kathrina Haraldsen, Argir, og Jens Sofus Thomsen, Hvalba. Aftaná vígsluna var reseptión í Ebenezer. Veitslan var fyri innbodnum á Hotel Føroyum.



Mikudagin 8. apríl giftust í Ebenezer Ásvør Færø og Bjarni Jøkladal, bæði úr Hoyvík. Móttøka var í Ebenezer eftir vígsluna. Veitslan var fyri innbodnum í Studentaskúlanum í Hoydølum.

## Tillukku við barninum



12. apríl fingu Kristina og Jón ein lítlabeiggja. Hann var 56 cm langur og vigaði 4.100 gr. Foreldur teirra eru Rósa Maria og Martin Brodersen í Hoyvík.

14. apríl fingu Dóra og Jan Gaard í Hoyvík eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3.650 gr.

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)

**Undirvísing og bøn eru týskvøld kl. 20.**

| | |
|---|---|
| 5. mai | Dópur í Hebron á Argjum kl. 19.30 |
| 12. mai | Samkomufundur / bønarløta |
| 19. mai | Húsbólkar |
| 26. mai | Bønarløta |

## Skeið í evangelisering


*Thom Cunningham*

Vikuskiftið Kristi Himmalferðardag, 20. til 24. mai 2009, verður skeið á Zarepta. Skeiðið hevur heitið "Each One – Reach One – Each One – Teach One". Endamálið við skeiðnum er at eggja og búgva út trúgvandi til persónliga evangelisering og til at taka sær av nýfrelstum og læra tey – ein og ein.

Undirvísari er Thom Cunningham trúboðari í NTM. Umframt at kunna um tørvin ímillum ónádd fólkasløg, so er hjartamál hansara at eggja øðrum trúgvandi at evangelisera í nærumhvørvinum – ein vinnur ein – ein lærir ein.

Skeiðið byrjar við náttúrða mikukvøldið 20. mai og endar við døgverða sunnudagin 24. mai. Undirvísingin verður á enskum. Aldursmark 18 ár og eldri. Kostnaður 650 krónur fyri hvønn. Tilmelding á telefon 32 19 19 eftir arbeiðstíð ella send teldupost til: office@ntm.fo

## Várfest í Havn

Várfest er heitið á einum nýggjum tiltaki, sum samkomur í Tórshavn standa saman um í miðbýnum sunnudagin 17. mai 2009. Byrjað verður kl. 15, og nógv spennandi er á skránni.

Endamálið við tiltakinum er at vísa familjunum ein kristindóm, sum bæði kann vera spennandi, avbjóðandi, hugtakandi og stuttligur. Vit vilja skapa eitt umhvørvi, har bíbilski boðskapurin verður boðaður á ein alternativan hátt við drama, sjónleiki og upplivilsum.

Brúk er fyri fólki at hjálpa til við tiltakinum. Áhugað kunnu venda sær til Lív Clementsen á tel. 516714 ella 317614.

Les meira á heimasíðuni: www.livdin.fo

## Bønarløtur á Brekku

Skipað verður fyri bønarløtum í hølunum á Brekku hvønn mánadag kl. 08.10, hvønn týsdag kl. 16.10 og hvønn fríggjadag kl. 12.10. Haraftrat er ein bønarløta hvønn sunnumorgun kl. 10.10 í Hoyvíkar skúla.

Á bønarløtunum á Brekku verður umframt at biðja eisini gingið gjøgnum bønirnar í Sálmunum. Tað eru Jógvan Zachariassen og Poul Guttesen, sum skipa fyri.

## Mammubólkur á Brekku

Annanhvønn fríggjadag kl.10.30 savnast mammubólkur í hølunum hjá Lívdini á Brekku 3 í Hoyvík. Mammubólkurin savnast fríggjadag í líka viku, t.e. viku 42, 44, 46 o.s.fr. Allar mammur við smáum børnum eru vælkomnar.

Er okkurt at spyrja um, eru tit vælkomnar at ringja til Lív Clementsen á tel. 516714 / 316714.

## Innsavning til Bíbliur




Á kunningarborðinum í Lívdini stendur ein krukka, sum fólk hevur høvi at lata pening í til at prenta Bíbliur í Kina. Kostnaður fyri prent og útbreiðslu av einari Bíbliu í Kina er 20 kr.

Eisini ber til at stuðla tiltakinum við at flyta pening á kontu í Eik banka: 9181 128.239.7, viðmerkt: Bíbliur til Kina.

## Verið við til at stuðla

Við fastari mánaðarligari flyting til byggigrunnin hjá Lívdini ber til at stuðla við at seta pening inn á konto nr. 9181-530.707-6 í Eik Banka. Flytingarskjøl eru á kunningarborðinum í Lívdini sunnudagar.


lívdin

Verið við til at stuðla

Stuðulsskjal at lata inn til tygara peningastovn

Eg vil við hesum stuðla bygginini av nýggja samkomubygninginum hjá Lívdini við hesi upphædd hvønn fyrsta í mánaðinum (set kross):

☐ 250 krónur ☐ 500 krónur
☐ 750 krónur ☐ 1.000 krónur
☐ ________ krónur

Hetta er ein áheitan til peningastovn mín um at flyta nevndu upphædd inn á kontu hjá byggigrunninum

**Eik Banki konta 9181 530.707-6**

av kontu míni nr. ________ (konta nr.)

í ________ (navn á peningastovni)

________ tann, ________

________ Navn (við spjøldrastavum)

________ (undirskrift)

www.livdin.fo

## Árini koma og fara

Árini koma og fara,
steðga ei á síni ferð,
veri tað okkum ein læra
um, hvussu stokkut alt er.

Tíðin sum áin man renna
støðugt í aldanna hav.
Dagligt vit fáa at kenna
náðina, dagurin ber.

Dagur, sum dettur av degi,
tímin og stundin, sum svann
– um gjøgnum sorg ella gleði –
troyst í Guds náði eg fann.

Áin og fossurin fara,
jørðin og himmalin við,
náðin, ið ævigt skal vara,
veitir mær fullkomnan frið.

*Yrkt: Árni Jacobsen 03.04.05*

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla



Absalon



Jógvan



Poul



Thom

### Sunnudagin 3. mai

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Bøn* |
| | *Talari: Absalon Áargarð* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið 12:9-14* |
| | *Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 10. mai

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Bøn* |
| | *Talarar: Glóðin* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Synda við dirvi* |
| | *Talari: Poul Guttesen* |

### Sunnudagin 17. mai

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Each one reach one* |
| | *Talari: Thom Cunningham* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið 12: 14-21* |
| | *Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 24. mai

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Kendir sangir* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið 13:1-10* |
| | *Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 31. mai. Hvítusunnudagur

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Leiðsla Heilaga Andans í mínum lívi* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Hvítusunna* |

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*